Løgmaður:

# -Vit mugu marknaðarføra undirgrundina

**- At talið av umsóknum um leitingarloyvi hevur verið minkandi, og at onkur feløg fyribils hava tikið seg úr føroyska økinum, hevur kanska fingið onkran at ivast í, hvussu bjarta framtíð oljuvinna í Føroyum nú man hava. Tað dugi eg onga orsøk at síggja til at seta spurnartekin við. Tí vit hava eina "vøru" at selja segði Kaj Leo Johannessen, løgmaður, tá hann setti oljuráðstevnuna í Havn**

OLJURÁÐSTEVNA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*-Vit hava enn áhugaverd øki og jarðfrøðiligar fláir, ið antin als ikki eru kannaði ella eru ikki kannað nóg væl.*

Góðu fyriskiparar, góðu áhoyrarar.

Hetta at varpa ljós á oljuvirksemið við einum tiltaki sum hesum, er avgjørt viðkomandi. Ikki minst í hesum tíðum, tá avbjóðingarnar eru stórar bæði hjá okkum sjálvum og úti í heimi. Hóast tað ofta hevur verið nevnt, at viðvíkjandi hesum at finna olju, mugu vit geva tol, so kann tað vera vert at minna á tað enn einaferð. Dregur tað út at finna oljuna, skulu vit ikki sita hendur í favn, men framhaldandi stremba ímóti at brúka teir møguleikar, sum eisini leitivirksemið gevur.

Eg fari at takka tykkum, ið hava tikið stig til at skipa fyri hesum tiltaki, sum eitt gott íkast til framhaldandi at hava fokus á hetta virksemið.

### Ikki óvæntað

Nú fara at verða 9 ár síðani fyrstu oljuleitingarloyvini vórðu latin. Í løtuni eru 16 oljufeløg virkin á føroyska økinum, og slakir 18.000 ferkilometrar av landgrunninum eru í løtuni lutaðir til oljuleiting. 6 brunnar eru boraðir, og 1 verður boraður fyrst í komandi ári.

Tá bjóðað varð út fyrstu ferð, var áhugin ovurhonds stórur at fáa leitingarloyvi, meðan talið av umsóknum hevur verið lægri í báðum teimum seinastu umførunum. Tann gongdin er hvørki óvæntað ella ónatúrlig, tí í fyrsta útbjóðingarumfarinum vórðu flestu økini, ið mest vitan var um, latin. Síðani hevur leitingin flutt seg meira spakuliga inn á nýggj øki.

Eitt endamál við at hava útbjóðingarumfør er nevniliga at hava gongd í leitingini, soleiðis at virksemið alla tíðina flytur seg – eisini tá eldri loyvi verið latin inn aftur. Seinasta útbjóðingarumfar, ið varð hildið seint í fjør, var talið av umsóknum ikki høgt. Men vit eru kortini nøgd við, at vit fáa leitivirksemi ymsa staðni á landgrunninum. Bæði sunnanfyri, og ikki minst, at eitt stórt økið afturat norður við markinum eystanfyri verður kannað tey næstu árini.

Eg havi skilt, at sera nógv vitan um undirgrundina, er løgd afturat hesi árini, leitivirksemi hevur verið.

### Eina eina "vøru" at selja

At talið av umsóknum um leitingarloyvi hevur verið minkandi, og at onkur feløg fyribils hava tikið seg úr føroyska økinum, hevur kanska fingið onkran at ivast í, hvussu bjarta framtíð oljuvinna í Føroyum nú man hava. Tað dugi eg onga orsøk at síggja til at seta spurnartekin við. Tí vit hava eina "vøru" at selja. Men vit kunnu ikki og skulu ikki seta okkum afturá, og bara vænta, at alt gongur av sær sjálvum. Vøran selur seg ikki sjálv, men má seljast. Tað gera vit partvís longu við, at dátur, ið ikki longur eru heftar av trúnaði, verða seldar fyri ein kostnað, ið bara er ein lítil brotpartur av tí, sum tað upprunaliga hevur kostað feløgum at fáa tær til vega. Tankin við at selja tær bíliga er, at tær skulu koma flest møguligum til góða og verða við til at fremja leitivirksemið.

Vit hava enn áhugaverd øki og jarðfrøðiligar fláir, ið antin als ikki eru kannaði ella eru ikki kannað nóg



*Fv. Árni Olafsson, fyrrv. formaður í Oljuráðleggingarnevndini, Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi og Morten Hahn-Pedersen, serkønur í oljusøgu*